## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag, leygardagin og sunnudagin:**
Fleyr til gul av norði, turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin møguliga okkurt ælið. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Norðurlendskt gospel í Norðurlandahúsinum



*Tey bæði norsku kórini eru júst komin í land av Norrønu, og stemningurin er í topp. Seinni sama dag varð leiðin løgd til Sands, har tey hugna sær og syngja saman*

*Mynd: Bárður*

**Mánakvøldið verður serstøk føroysk-norsk gospelkonsert í Norðurlandahúsinum. Íalt fara 60 ungdómar at framføra sang, drama, dans og tónleik**

KONSERT
*Snorri Brend*

**Havn:** Við Norrønu mikudagin fingu tey ungu í KFUM vitjan av ikki færri enn tveimum ymiskum tensing-kórum úr Noregi.

Hetta eru kór, sum føroyska tensingkórið "Sound og Glory" hevur havt eitt ávíst samstarv við, og sum nú í felag hava fyrireika eina Føroya-ferð, har konsertin mánakvøldið er ein partur av hesi.

Teir 60 kórlimirnir – 30 úr hvørjum landi – eru í hesum døgum á legu á Sandi, har tey hugna sær, samstundis sum tey fyrireika seg til konsertina.

So mikið er greitt, at talan verður um eina sera áhugaverda konsert har fjølbroytt innsløg verða á skránni.

Ætlanin er, at føroyska kórið skal framføra nakrar sangir, eins og tey bæði norsku kórini hava sligið seg saman í eitt, og fara somuleiðis at framføra sínar sangir. Umframt hetta fara tey trý gospelkórini at syngja fleiri sangir í felagi.

Á skránni er ikki bert sangur og tónleikur, men har verður eisini ein partur við dansi og dramaleiki. Í staðinum fer ein tónleikabólkur at spæla nøkur løg.

Norsku gestirnir verða í Føroyum til 1. august.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 18 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 15 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 22 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 35 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 32 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 29 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 24 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Eitt lágtrýst, 996 hPa. nær Oslo fer spakuliga í landsynning.



**Í dag:**
Hátrýstið yvir Íslandi stendur mestsum í stað, men viknar nakað. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer í landsynning.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

### HITALAGIÐ




Hitalagið márt frá 20/7 kl. 06[00]– 21/7. 06[00]. Hitin í gjár: 12,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 20/7 kl. 06[00]– 21/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 44,2 mm




### VESTFALLSKYRRINDI

21. juli – Fullmáni/mánin næstur jørðini
28. juli – Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. Juli | 08.12 | 20.40 | 07.12 | 19.40 | 07.27 | 19.55 | 10.12 | 22.40 | 11.12 | 23.40 | 06.27 | 18.55 | 05.27 | 17.55 | 08.27 | 20.55 | 09.27 | 21.55 | 07.57 | 20.25 | 09.12 | 21.40 |
| 23. Juli | 09.09 | 21.35 | 08.09 | 20.35 | 08.24 | 20.50 | 11.09 | 23.35 | - | 12.09 | 07.24 | 19.50 | 06.24 | 18.50 | 09.24 | 21.50 | 10.24 | 22.50 | 08.54 | 21.20 | 10.09 | 22.35 |
| 24. Juli | 10.01 | 22.25 | 09.01 | 21.25 | 09.16 | 21.40 | - | 12.01 | 00.35 | 13.01 | 08.16 | 20.40 | 07.16 | 19.40 | 10.16 | 22.40 | 11.16 | 23.40 | 09.46 | 22.10 | 11.01 | 23.25 |
| 25. Juli | 10.50 | 23.12 | 09.50 | 22.12 | 10.05 | 22.27 | 00.25 | 12.50 | 01.25 | 13.50 | 09.05 | 21.27 | 08.05 | 20.27 | 11.05 | 23.27 | - | 12.05 | 10.35 | 22.57 | 11.50 | - |
| 26. Juli | 11.35 | 23.57 | 10.35 | 22.57 | 10.50 | 23.12 | 01.12 | 13.35 | 02.12 | 14.35 | 09.50 | 22.12 | 08.50 | 21.12 | 11.50 | - | 00.27 | 12.50 | 11.20 | 23.42 | 00.12 | 12.35 |

5 707265 100050 >